## UTTAN ÚR HEIMI

### Skal fyri ein krígsrætt

Amerikanska Lynndie England gjørdist kend, tá heimurin slapp at síggja myndir, sum avdúkaðu, hvussu amerikanskir hermenn fóru við teimum iraksku fangunum í Abu Ghraib-fongslinum í Bagdad. Á fleiri av myndunum sást Lynndie England brosa uppi yvir teimum bakbundnu, naknu fangunum.

Men nú er brosið horvið, tí amerikonsku myndugleikarnir hava gjørt av at seta hana fyri ein krígsrætt. Sjálv ákæran er ikki almannakunngjørd enn, men verji hennara hevur fingið at vita, at Lynndie England kemur fyri ein krígsrætt í Fort Bragg tann 15. januar.

Sjálv heldur Lynndie England uppá, at hon gjørdi ikki annað enn tað, sum hon fekk boð um at gera. Tað sama hava aðrir amerikanskir hermenn sagt. Teir siga, at yvirmenninir góvu teimum boð um at míkja fangarnar, so tað skuldi vera lættari at fáa teir at siga sannleikan.

### Stríð um sáttmálar

Í Noregi eru nógvir politikarar á gosi, eftir at tað er komið fram, at myndugleikarnir umhugsa at lata eina polska skipasmiðju byggja fimm gassriknar ferjur, sum skulu setast inn í strandfarasiglingina í Vesturnoregi.

Hildið verður, at tað fer at kosta umleið 1,2 milliard krónur at byggja ferjurnar. Politikararnir vísa á, at tað er sera umráðandi, at ferjurnar verða bygdar í Noregi, tí tað fer at tryggja umleið 500 arbeiðspláss. Teir krevja tí, at Børge Brende, vinnumálaráðharri, skal tryggja, at ferjurnar verða bygdar á norskum skipasmiðjum. Politikararnir vísa eisini á, at minst tvær norskar skipasmiðjur hava bygt slíkar ferjur fyrr og hava tí tær neyðugu royndirnar.

Men ráðharrin hevur svarað, at hann kann ikki taka fyrilit fyri viðurskiftunum á teimum norsku skipasmiðjunum. Tvørturímóti er prísurin avgerandi, og tí ætla myndugleikarnir at taka av tí lægsta tilboðnum, sigur hann. Sambært Dagsavisen bendir tað á, at ferjurnar verða bygdar í Pólandi.

### Øll sleppa ikki á val

Irakska stjórnin og amerikanska umsitingin í Irak hava sett sær fyri, at irakar skulu á val í januar, sama hvat tað kostar.

Men nú bendir nógv á, at allir irakar kunnu ikki rokna við at sleppa at velja. Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, hevur sagt einari nevnd hjá Senatinum, at tað kann væl henda, at einki val verður í teimum økjunum, har tað er serliga ófriðarligt. Við BBC sigur Rumsfeld, at soleiðis sum hann skilir støðuna í Irak, fer tað at bera til at halda val í trimum fjórðingum ella fýra fimtapørtum av landinum. Spurdur, um tað ikki hevði verið rættari at útsett valið, svaraði Rumsfeld avgjørdur nei.

Bæði George W. Bush, forseti, og irakski forsætisráðharrin, Ayad Allawi, hava sagt, at tað kemur ikki upp á tal at útseta tað ætlaða valið. ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, segði í síðstu viku, at batna trygdarviðurskiftini í Irak ikki, verður ikki talan um eitt veruligt val.

### Húsaprísurin hækkar

Avdráttarfrí lán og lá renta hava havt við sær, at húsaprísurin er hækkaður nógv í Danmark tað seinasta árið.

Ein kanning vísir, at í høvuðsstaðarøkinum er virðið á einum meðalstórum húsum hækkað umleið 250.000 krónur, og at í sjálvum Keypmannahavn er hækkingin um 300.000 krónur. Men tað loysir seg eisini at eiga hús aðrastaðni í landinum. Longri vesturi á Sælandi er húsaprísurin hækkaður meiri enn 150.000 krónur tað seinasta árið, og á Århus-leiðini er hækkingin um 130.000 krónur.

Tann hækkandi prísurin ger tað sjálvandi truplari hjá fólki at seta føtur undir egið borð, men donsku húsasølurnar siga, at eingin vandi er á ferð í so máta kortini. Skattalættar, lønarhækkingar og tey avdráttarfríu lánini gera, at fólk hava kortini ráð at keypa sær hús, siga tær.

# Kann enda við blóðbaði

**Myndugleikarnir í Svøríki stúra fyri, hvat kann henda, nú løgreglan leitar eftir tveimum flýddum fangum. Annar teirra er alvápnaður**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Svenska løgreglan hevur framvegis ikki funnið teir báðar menninar, sum flýddu úr einum fongsli hóskvøldið í síðstu viku. Menninir tóku ein fangavørð við sær, men hann bleiv funnin nakrar tímar seinni.

Sambært Aftonbladet hevur løgreglan illgruna um, at vinmenn hjá øðrum fanganum hjálpa honum at fjala seg, og at teir hava givið honum eina rúgvu av vápnum. Fangin, tann 28 ára gamli Tobias Jardeberg, verður hildin at vera limur í altjóða brotsmannafelagsskapinum International Evil Minds, sum hevur einar 50 limir í Svøríki.

– Tað eru teir, sum hjálpa honum og hinum fanganum. Teir hava givið teimum ísraelsk vápn. Hetta kann enda við einum hópdrápi, segði ein løgreglukelda við Aftonbladet í gjár.

Løgreglan heldur, at teir báðir fangarnir fjala seg onkunstaðni í Værmlandi ella Vestara Gøtalandi.

# Jeanne kravdi seks mannalív



**Fyri fjórðu ferð varð Florida rakt av einari tropiskari ódn um vikuskiftið, og tann fimta er longu á veg**

ÓDNARVEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Tær seinastu vikurnar hava verið ræðuligar, segði Joe Stawara við tíðindastovuna AP í gjár. Hann eigur eitt frítíðarøki á leiðini, har Jeanne herjaði sunnudagin. Tá hann gjáramorgunin fór at vita, hvussu vorðið var, lógu 232 oyðilagdir húsvognar og sløgdust á økinum.

Myndugleikarnir søgdu í gjár, at Jeanne hevði kravt minst seks mannalív. Frammanundan hevði hon kravt minst 1500 mannalív í Haiti og 24 í Dominikanska Lýðveldinum.

Í Florida oyðilegði ódnin fleiri hús, og meiri enn ein millión fólk høvdu mist streymin. Mong teirra høvdu heldur ongan streym frammanundan, tí elveitingin fór, tá ódnin Ivan herjaði har fyri trimum vikum síðani.

Myndugleikarnir í Florida siga, at ódnirnar, sum hava verið í seinastuni, hava gjørt skaða fyri meiri enn 100 milliardir krónur. Men enn er ikki liðugt. Amerikonsku veðurmenninir siga, at ein onnur ódn er á veg. Hon hevur fingið navnið Karl og er í løtuni yvir Atlantshavinum og fyrireikar seg til at fara ímóti landi.

# Bush misbrúkar 11/9

**Demokratiska varaforsetaevnið, John Edwards, vil vera við, at mótparturin misbrúkar vanlukkuna tann 11. september í 2001 til egnan politiskan fyrimun.**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

John Edwards er sannførdur um, at valstríðið hjá republikanska flokkinum fer at býta amerikanska fólkið sundur í tvey. Í einari røðu sunnudagin segði hann, at allir amerikanarar og ikki bara republikanararnir eru til reiðar at verja USA og amerikanska fólkið ímóti altjóða yvirgangi.

– Sannleikin er, at republikanararnir royna at fáa vinning burtur úr einari av teimum størstu vanlukkunum, sum hevur rakt land okkara. Tað er ómoralskt og skeivt, segði Edwards.

Hann sipaði til eina sjónvarpslýsing hjá einum republikonskum felagsskapi. Í lýsingini vóru myndir av Osama bin Laden og myndir frá atsóknum í USA, Spania og Russlandi. Síðani vórðu hyggjararnir spurdir, um teir høvdu álit á, at John Kerry var førur fyri at standa ímóti slíkum.


Stovnið breiðband fyri

0,- kr.*)

Prísir úr 280,- kr./mðr.

Stovnar tú I-net Privat Breiðband frá Føroya Tele, geva vit tær stovningina púra ókeypis - tú sparir 750,- kr.

Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...

I·net BREIÐBAND

**) Treytað av at tú teknar I·net privat breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 1. novembur 2004. Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.*

FØROYA TELE

petur & petur • 320870



Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2005 er mánadagin 1. nov. 2004




**Í mars 2005 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist við óbroytt.**

**Hvítu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2005 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 660 í telefonbókini 2004,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ................................ kr. 700,00
(B) Innramming ..................................... kr. 800,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) . kr. 25,00
(sí dømi á s. 658 í Telefonbókini 2004)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 659 í telefonbókini 2004, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo FØROYA TELE